# Ásetingar fyri øki B2: Sethúsaøki – serstøk byggisamtykt

## Sethúsaøkið við nýggju útsykkingina við ´´Hestteigar´´

Hendan serstaka byggisamtykt hevur til endamáls, at skipa útstykkingina til sethús umframt raðhús. Økið, sum er ústykkjað, fevnir um 17 grundstykkir til sethús, 1 øki til raðhús, 2 grøn økir, umframt veg og gonguteig.

Fyri viðurskiftir, sum ikki eru skipað í hesi byggisamtyktini, er almenna byggisamtyktin hjá Skopunar kommunu galdandi.

### § 1 ENDAMÁL

1.1 At skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til sethúsa og raðhúsaøki.
1.2 At tryggja, at skipanin av økinum verður sum sýnt í kortskjali 1, 2 og 3.

### § 2 BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

2.1 Øll bygging í økinum, ið serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

2.2 Mest loyvda byggistig er 0,3. Grundøkir sum eru i Øki 3 og 4 kunnu leggja 0,1 afturat.

2.3 Mest loyvda nýstlustig er 0,8.

2.4 Mest loyvdu hæddir eru fylgjandi:

**Øki 1** Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt á útveggi og 9 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli kunnu í mesta lagi vera 6 m í tí lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 7,5 m.

**Øki 2** Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt á útveggi og 7,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli, kunnu í mesta lagi vera 6 m í tí lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 7,5 m.

**Øki 3** Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt á útveggi og 6 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 4,5 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli kunnu í mesta lagi vera 4,5 m í tí lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 6 m.

**Øki 4** Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 3,5 m til hægsta punkt á útveggi og 5 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 3.5 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli kunnu í mesta lagi vera 3,5 m í tí lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 5 m.

**Øki 5** Raðhús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 3 m til hægsta punkt á útveggi og 4 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

-Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 4 m til hægsta punkt.

-Hús við einvegis takhalli kunnu í mesta lagi vera 3 m í tí lægru síðuni, meðan tann hægra síðan og hægsta punkt á útveggi í mesta lagi má vera 4 m.

2.5 Loyvt er at byggja kvist á báðum síðum, tó í mesta lagi helvtina av longdini av húsinum. Um kvistar verða bygdir á báðum síðum, skulu hesir so vítt møguligt vera symmetriskir, kvistur skal sum útgangstøði byggjast frá mittu av húsinum og veksa úteftir. Hetta punkt er galdandi fyri øki 1,2 og 3

2.6 Frástøða frá grannamarki skal vera sum víst á tekning, 5 m frá innkoyring og 2,5 m frá mark. Tó kann byggivaldið, tá ið talan er um minni týðandi veg, ella tá ið lendið ikki loyvir tí, geva loyvi til, at frástøðan kann vera sett nærri vegi.

2.7 Loyvt er at økja um byggi- og nýtslustigið við 0,1, tó í mesta lagi 50 m$^2$, sum bert kann nýtast til bilhús, bilskýli, úthús, yvirdekkað øki o.tíl.

## § 3 VEGIR, GARÐAR OG PARKERINGSPLÁSS

3.1 Innkoyringar á grundøkini skulu gerast sambært kortskjal 2

3.2 Nóg stórt øki skal vera lagt av til parkeringspláss hetta fyri at tryggja, at íbúgvar og vitjandi fáa sett akfarið frá sær á økinum. Pláss skal vera til í minsta lagi tveir bilar til hvørt grundøki. Eru tveir bústaðir í einum sethúsi, skal vera pláss fyri í minsta lagi tveimum parkeringsplássum til hvønn bústað.

3.3 Tað er ábyrgd eigarans, at kantsteinar, vegristir og asfalt í økinum ikki fáa skaða undir byggingini. Um skaði verður gjørdur, verður hetta umvælt av kommununi uppá eigarans rokning.

3.4 Við vegasamankoyringar og innkoyringar á grundøkir verða ásett útsýnisøki. Innan fyri hetta má eingin lutur av lendi, bygningi, girðing ella vøkstri verða hægri enn 1 m yvir hæddarstig á vegmiðju framman fyri grundøki, sum talan er um. Byggimyndugleiki ásetur stødd/vídd av úsýnisøki.

**§ 4 BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR**

4.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Skopunar kommunu einsamallari.

4.2 Smávegis lættar/broytingar frá reglum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin/útsjóndin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

4.3 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt bygdaráðsins og góðkenning landstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.






*Kortskjal 2 – Yvirlitskort fyri serstaka byggisamtykt*




*Kortskjal 3 – Skurður A,B og C*